Í kjalarvørri Robinson Kruso

Enn einafer› hevur Tróndur Patursson veri› á ævint‡rkendari fer› saman vi› Tim Severin. Hesafer› gekk lei›in í 120 ára gomlum seglbáti í kjalarvørri Robinson Kruso. Heimsgitna søgan er bygd á veruligar hendingar og tá eins og nú eru sjórænarar og smuglarar partur av fer›ini, eins og springarar, súlur og skaldbøkur.



Tróndur Patursson, føroyskur listama›ur og ævint‡rari. Fyri viku sí›ani kom hann aftur av fer› í kjalarvørri Robinson Kruso í 120 ára gomlum seglbáti. Fer›ina gjørdi hann - sum so mangan - saman vi› írska ævint‡raranum Tim Severin

DAGFINN OLSEN

Fyri sjeyndu fer› hevur Tróndur Patursson veri› á ævint‡rkendari fer› saman vi› ævint‡raranum Tim Severin. Hann er sera áhuga›ur í, hvussu fólk hava klára› seg og hvussu ymsar fer›ir eru gjørdar, men eisini fleiri skaldsøgur hugtaka. T.d. var seinasta fer›in eftir íblástri av bókini Moby Dick.

Men henda fer›in, i› nú hevur veri› gjørd, var í kjalarvørri Robinson Kruso.

Søgan er heimsgitin og Føroyum frá 10 ára aldri í 1914. Sverri Patursson úr Kirkjubø t‡ddi og útgávan var› tá stu›la› úr Noreg. Í 1990 'unum kom hon aftur út og fyri at minnast stórhendingina í 1914, var› hon tá latin øllum skúlabørnum í 6. og 7. flokki.

Fyri viku sí›ani kom so annar ma›ur úr Kirkjubø aftur av fer›, har hendingarnar í bókini um Robinson Kruso eftir høvundin Daniel Defoe vóru orsøk til fer›ina.

Uppreistur

Fer›in hjá Tróndi Patursson og Tim Severin gekk í einum 120 ára gomlum seglbáti, i› ikki hevur motor. Fari› var› frá oynni Grenada.

Tróndur grei›ir frá, at óiva› er bókin um Robinson grunda› á fleiri veruligar hendingar, i› fóru fram mi›skei›is í 1700 árunum.

Søga er um uppreistur umbor› á skipi, har t‡skur ma›ur var› bundin til eina hur› og tveittur á bláman. Hann kom á eina oyggj, Serama, i› er partur av Swan Islands. Hann lívbjarga›i sær har í 7 ár. Oyggin var tá óbygd og einki vatn var.

Nógvar skjaldbøkur komu á land á oynni og ma›urin lívbjarga›i sær. Hann koppa›i teimum á, so tær sluppu ikki uppaftur. Umframt at fáa kjøt, so n‡tti hann skjøldrini til at savna regnvatn í.

Ein trupulleiki var, at klæ›i hev›i ma›urin eingi at verja fyri sólini. Tískil sigst, at hári› vaks á kroppinum og hann fekk nærum faks. Tá hann kom heimaftur til T‡sklands, vann hann fitt av peningi vi› at ver›a vístur fram.

Á oynni livdi ma›urin av krabbum og skeljum. Ta› eydna›ist honum at fáa eld. Hart grót var ikki á oynni, men burturgingin skip høvdu grót til barlast og hesum svam hann eftir og fekk í land, so hann kundi sláa grót saman og harvi› útvega eld.

Eingin romantikkur

Søgan sigur, at onnur komu eisini í land. Men tann, sum í søguni gjørdist mannaátarin Fríggjadagur, var í veruleikanum úr Europa.

- Alt passar nokkso væl, sigur Tróndur, men tann romantikkur, sum er í skaldsøguni, hóskar ikki so væl vi› veruleikan.

Mangt bendir á, at Daniel Defoe hevur n‡tt fleiri hendingar og fleiri fyrimyndir til søguna um Robinson.

Ein frásøgn er um mann, nevndur Alexander Selkirk, i› eisini rak á land á óbygdari oyggj. Hesin sigst eisini hava veri› fyrimynd til skaldsøguna um Robinson, i› annars er komin í fleiri hundra› útgávum, sí›ani upprunahandriti› var› skriva›.

Tróndur Patursson heldur, at hesin Selkirk møguliga var› hann, i› kom á land á eini oyggj, i› ber navni› Fugloyggin. Hesi oyggj komu Trondur, Tim og fer›alagi› eisini framvi› á fer›ini.

Fer›in var 1400 fjór›ingar og teir sigldu teinin frá Grenada til Honduras uppá 17 dagar.

Til matna skutla›i Tróndur m.a. ein springara. Hinir vóru heldur ivasamir hesum vi›víkjandi, men teimum dámdi tó væl matin. Eisini fingu teir háv og fisk og eisini fugl. Á Fugloynni átti súla í mangotrøunum

Sí›ani 1976

Tim Severin er úr Írlandi og hevur gjørt mangar fer›ir av ymsum slag og vanliga kemur bók burturúr. Partur av fer›ini í kjalarvørri Robinsson er m.a. søgur um sjórænarar og smuglarar.

Tim skal gera ein film til sjónvarpsrásina Discovery, i› mest sn‡r seg um indiánar á lei›ini. Har á lei›ini eru mangir smuglarar og vøran er mest drøgg. Teir sigla í smáum bátum langar teinar og tá teir koma at landi, søkkja teir bátarnar og svimja í land. Har fáa bátarnir so loyvi at liggja eina tí›, til onkur so tekur teir uppaftur.

Tim hevur skriva› mangar bøkur og so ver›ur eisini hesafer›. Og sum so ofta, so er ta› Tróndur, i› ger tekningarnar til bókina.

Samstarvi› millum Trónd og Tim byrja›i í 1976, tá Tim kom á Havnina í skinnbátinum Brendan. Honum tørva›i ein mann. Helst ein fotograf. Men Tróndur fór vi› sum teknari og so hev›i hann eisini tann fyrimun, at hann var førur fyri at útvega fríska fø›i úr havinum á fer›ini.

Fyrimunurin vi› at hava ein teknara vi›, umframt myndatól, er, at ikki alt kann avmyndast vi› fototólinum, tí ein sleppur ikki útum sjálvan bátin, grei›ir Tróndur frá og leggur afturat, at eisini er gamal si›ur kn‡ttur at hesum vi› slíkum fer›um og tekning.

Sí›ani hava teir bá›ir Tim og Tróndur veri› manga ævint‡rfer›ina saman. Nevnast kunnu Sindbad fer›in, Jason fer›in, China Voyage og Spice Islands fer›in og í kjalarvørri Moby Dick.

Mong keypa eisini fer›abøkurnar, sum eitt savn, og tá er eisini fyrimunur, at frásøguma›urin og teknarin eru teir somu.

Tim, sum er sera áhuga›ur í, hvusu fólk hava klára› seg, og í burturgingnum skipum, hevur eisini áhuga í Føroyum, hóast mangar av fer›unum hava veri› undir heitari himni.

Tim hevur spurt seg fyri hjá Tróndi, um ikki áhugaverdar søgur eru at fara eftir í Føroyum og Tróndur hevur játtandi greitt frá um burturgingin skip í Lítlu Dímun og í Saksun, men eisini t.d. vi› Íslands strendur.

Umframt at hava fer›ahug, hevur listama›urin Tróndur nógv jørn í eldinum. Hann hevur fleiri frams‡ningar í Danmark, hevur júst gjørt glasarbei›i í kirkju í Odense og talan er um verk til Dómkirkjuna í Newcastle og til floghavnina í Kastrup.

Men hóast allar uppgávurnar, so tykist strongd ella viknandi fer›ahugur ikki merkja mannin, tá hann grei›ir frá um møguligar fer›ir saman vi› Tim Severin í høvunum á okkara lei›um.

- Ta› er einki at ivast í, at ta› ver›ur framtí›in, sigur Tróndur Patursson hugagó›ur, hóast bert ein lítil vika er gingin, sí›ani hann stevndi heimaftur av fer› í kjalarvørri Robinson Kruso.

Manningin, i› gjørdi sonevndu China Voyage fyrst í 90'unum



Til matna skutla›i Tróndur m.a. ein springara. Hinir vóru heldur ivasamir hesum vi›víkjandi, men teimum dámdi tó væl matin



Á kortinum sæst farlei›in, sum Tróndur, Tim og fer›alagi› gjørdi í einum 120 ára gomlum seglbáti. 1400 fjór›ingar í 17 dagar



Tim Severin, ævint‡rari úr Írlandi. Saman vi› honum hevur Tróndur Patursson gjørt manga ævint‡rfer›na



AMSTERDAM
2997,-
Tur/retur via Billund **)
Ferðaavgjøld íroknað

ATHEN
3296,-
Tur/retur via Keypmannahavn *)
Ferðaavgjøld íroknað

LISSABON
3296,-
Tur/retur via Keypmannahavn *)
Ferðaavgjøld íroknað

LONDON
2991,-
Tur/retur via Billund **)
ella Keypmannahavn *)
Ferðaavgjøld íroknað

NICE
3107,-
Tur/retur via Billund *)
Ferðaavgjøld íroknað

PARÍS
3010,-
Tur/retur via Billund **)
Ferðaavgjøld íroknað

VENEDIG
3095,-
Tur/retur via Keypmannahavn *)
Ferðaavgjøld íroknað

DUBLIN
3094,-
Tur/retur via Billund *)
Ferðaavgjøld íroknað

Bíligir ferðaseðlar frá Maersk

Frá 1. juli til og við 13. august ber til at ferðast við flogfari millum Føroyar og onnur lond í Evropa, so bíliga sum ongantíð áður. Einastu treytir, at fáa bíligar ferðaseðlar, eru vanligar apex-treytir, umframt at minst tvey vaksin skulu ferðast saman. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

Børn undir 12 ár fáa 50% í avsláttri av flogprísium, tá ferðast verður saman við vaksnum

Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan og í tíðarskeiðinum 1. juni 2000 til og við 16. juli 2000. Bíleggingar kunnu ikki broytast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Minst tvey vaksin skulu ferðast saman.
**) Gisting eina nátt í Danmark (ikki íroknað)*
***) Flogið verður víðari sama dag*

MAERSK AIR